# Kommunusamanlegging ávirkar ikki arbeiðarafeløgini kring landið

**Ivi hevur tikið seg upp um tað vrður neyðugt at umskipa tey ymsu arbeiðarafeløgini, nú kommunur leggja saman. Men tað er ikki neyðugt, staðfestir Føroya Arbeiðarafelag**

KOMMUNU-SAMANLEGGING OG FAKFELØG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í hesum døgum verður nógv burturúr at leggja kommunur saman ymsastaðni í landinum. Men fara hesar kommunusamanleggingar at ávirka fakfeløgini? Tað var ein spurningur, sum varð reistur á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.



*Kommunusamanlegging fær onga ávirkan á bygnaðin í Føroya Arbeiðarafelag, fekk fundarfólkið at vita á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið*

Spurt varð, um tað kanska fór at vera neyðugt at leggja lokalfeløgini um fyri at fylgja kommunumarkinum.

Spurt var eisini um limir í eini kommunu, kunnu velja, hvørjum felag, teir vilja vera í, um fleiri feløg eru í eini kommunu.

Men svarið frá Føroya Arbeiðarafelag er eitt greitt nei.

Ingeborg Vinther vísti á tað feskasta dømi sum kom upp á tal, nú Kollafjørður fór upp í Havnina.

Hóast nógvar ágangandi royndir vórðu gjørdar at fáa Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag upp í felagið í Havn, varð hetta av ongum og felagið í Kollafirði er sostatt framvegis limur í Føroya Arbeiðarafelag, segði Ingeborg Vinther.

– Tá varð avtalað gjørd um, at Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag skuldi framhaldandi vera eitt sjálvstøðugt felag og síðani hevur onki stríð verið um tað.

Tað varð eisini upplýst, at skuldi tað verið okkurt lokalfelag, har tað ikki heilt er greitt ásett, hvat øki, felagið umfataði, var tað bara at broyta lógina so at tað greitt kom at standa, hvat øki felagið fevnir um. Hinvegin kunnu feløg altíð gera av at leggja saman og tað er hent hjá onkrum lokalfelag.

Nevnt varð eisini, hvussu verður, nú allar kommunurnar í Sundalagnum leggja saman, men har var onki frammi um, at arbeiðarafeløgini ætlaði at leggja saman.

– Tað ber eisini væl til at ymisk feløg gera avtalur sínamillum um, at limur kunnu frítt arbeiða inni á økinum hjá hvørjum øðrum.

Hinvegin ber tað eisini til hjá Føroya Arbeiðarafelag at staðfesta, hvar øki hoyrir undir hørt av lokalfeløg-unum, men tað ber eisini til.

## Ingeborg fekk gott tips frá embætismanni í landsstýrinum



*Mangt fer fram handan leiktjøldini, sum vit lítið vita um. Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag avdúkaði Ingeborg Vinther fyri fundarfólkinum, at hon fekk eitt tips frá einum embætismanni í Tinganesi og tað bjargaði arbeiðsloysisgrunninum hjá felagnum*

**– Tá ið Landsstýrið ætlaði at taka arbeiðsloysisgrunnin, fekk Ingeborg Vinther eitt tips frá einum embætismanni**

VERKAMANNA-GRUNNUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var ein embætismaður í Landsstýrinum, sum bjargaði Arbeiðsloysisgrunninum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Hesa áhugaverdu avdúkingina kom Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag við á aðalfundinum um vikuskifti.

Arbeiðsloysisgrunnurin var ein grunnur, sum var rættiliga gamal. Talan var um ein grunn, sum Landsstýrið varð við til at betala til. Talan var um stuðul til tey stóru fakfeløgini og ætlanin var, at hann skuldi brúkast til arbeiðsloysi.

Men tá ið tær ringu tíðirnar komu í nítiárunum og tá skeyt landsstýrið upp, at peningurin úr grunninum varð brúktur til at íløgur í arbeiðspláss.

– Vit svaraðu aftur, at vit høvdu so nógv lokalfeløg, at skuldu vit býta peningin sundur ímillum tey, bleiv onki í part, so tað hildu vit ikki var nøkur loysn.

– Men so ringdi ein embætismaður úr Tinganesi og gav okkum tey góðu ráð, at vildu vit bjarga grunninum, máttu vit ikki taka hann upp á tungu aftur, tí partar av landsstýrinum høvdu í kvittanum at taka grunnin til arbeiðsloysisskipanina.

Tað vildu vit ikki góðtaka, tí hini feløgini, sum høvdu fingið úr grunninum, høvdu brúkt sínar grunnar og vit vildu ikki góðtaka, at vera einasta felag, sum skuldi brúka grunnin til ALS.

– Tí settu vit ístaðin uppá at fáa fult ræði á grunninum.

Tað endaði við, at roknskaparleiðarin í Føroya Arbeiðarafelag fór ein dagin oman í Tinganes og har setti hann seg og gav landsstýrinum tey boð, at hann fór ikki avstað aftur, fyrrenn hann hevði fingið váttan frá landsstýrinum um, at Føroya Arbeiðarafelag fekk fulla heimild yvir grunn-inum.

Tá ið hann hevði sitið í tríggjar tímar, fekk hann sín vilja, so soleiðis varð tað Føroya Arbeiðarafelag, sum einsamalt fekk heimildirnar yvir grunninum.

## Skulu hava betri tamarhald á limunum

**Føroya Arbeiðarafelag hevur nú staðfest, hvør kann verða roknaður at verða virkin limur í teimum ymsu lokalfeløgunum**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú hevur Føroya Arbeiðarafelag staðfest, hvør kann verða roknaður at vera virkin limur í einum av lokalfeløgunum kring landið, sum eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað gjørdi felagið á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Tá samtykti aðalfundurin, at virkin limur eru teir, sum eru á arbeiðsmarknaðinum.

Men tey eru eisini at meta sum virknir limir, sum eru givnir á arbeiðsmarknaðinum vegna sjúku, arbeiðsvanlukku, ella øðrum, men sum framvegis eru virknir limafelag hjá Føroya Arbeiðarafelag, antin sum nevndarlimur ella tí at teir hava annað álitisstarv innan felagsøki hjá meginfelagnum.

Somuleiðis eru teir roknaðir sum virknir limir, ið rinda lívstryggingargjald til Føroya Arbeiðarafelag og eisini teir limir, ið rinda til egna eftirløn. Og harafturat eru eisini tey mett sum virknir limir, ið eru arbeiðsleysir, men sum kortini rinda prosentgjald til limafelagið og Føroya Arbeiðarafelag.

Samstundis hevur hvørt lokalfelag atkvøðurætt á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag eftir talinum á teimum virknu limunum.



*Øll lokalfeløgini í Føroya Arbeiðarafelag hava nógvar limir, sum ikki eru virknir. Men nú er staðfest, hvør kann roknast at vera virkin limur og eftir hesum limatali fær verður atkvøðutalið hjá hvørjum lokalfelag á aðalfundi í FA, roknað út. Her atkvøða tey á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskifti*



Mentamálaráðharrin:

# Føroysku bløðini eru ov tunn

**– Sogið í føroyska blaðheiminum er alt ov tunt, og um bløðini høvdu lækkað um mongu útgávurnar, høvdu vit fingið nógv betri góðsku í tíðindatilfarinum, sigur Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*




*Jógvan á Lakjuni er her avmyndaður, tá hann á fakfestivali fyri føroyska blaðheimin segði, at færri bløð skuldu verðið givin út til frama fyri góðskuna. – Sogið er ov tunt á stóru bløðunum, og er hetta ein avleiðing av, at heili fimm útgávur eru á skránni um vikuna, sigur mentamálaráðharrin*

*Mynd: Jan Muller*

Fyri nøkrum vikum síðani varð fakfestivalur á Sjómansskúlanum í Havn fyri føroyska fjølmiðlaheiminum. Stórur partur av landsstýrismanningini var til staðar, og millum røðararnar á festivalinum var landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni. Í stuttari viðmerking nevndi hann tá, at framleiðslan í føroyska blaðheiminum tyktist vera ov stór, tá hugt varð at góðskuni í somu bløðum.

### Bløðini slaka við góðskuni

Spurdur, hvat hann ítøkiliga meinti við hesi útsøgn fyri nøkrum vikum síðani, heldur mentamálaráðharrin fast við, at við eini skerjing í hópframleiðsluni hevði støðið hækkað munandi.

– Sogið í føroyska blaðheiminum er í løtuni alt ov tunt. Hetta er tengt at mongu útgávunum, sum hvørja viku eru á skránni hjá stóru bløðunum, og tá kann tilfarið ikki gerast nóg gott, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann undirstrikar, at hann als ikki ynskir at vera negativur yvirfyri føroyska blaðheiminum, men vil hann heldur vísa á, hvussu góðskan í størri mun kundi verðið sett í hásætið, um farið varð frá núverandi fimm útgávunum og niður í eitt lægri útgávutal.

– Tá eitt so lítið samfelag framleiðir so nógv tíðindatilfar, kann úrslitið ikki vera betri, enn tað er, og tískil skuldi verðið umhugsað at skorið niður í framleiðsluni, heldur landsstýrismaðurin í mentamálum. Hann heldur tað vera ein náttúrlig niðurstøða, at bløðini høvdu verið betri, um framleiðslan minkaði.

Spurdur, um fíggjarliga ikki er veruleikafjart fyri bløðini, heldur Jógvan á Lakjuni fast um, at bløðini kunnu gerast betri.

– Hóast tað møguliga botnar í fíggjarligum viðurskiftum, har bløðini noyðast at útvega neyðugu inntøkurnar, verður tað eftir mínum tykki slaka á økinum, sum viðvíkur blaðgóðsku, slær Jógvan á Lakjuni fast.

### Saknar útbúgving

Í framhaldi av hesum vísir Jógvan á Lakjuni á, at politiski myndugleikin sjálvsagt ikki kann blanda seg í, hvat privatu bløðini gera, og tískil er talan bert um hugskot og eygleiðingar, sum bløðini sjálvi mugu taka støðu til.

– Tað er grundlegggjandi øðrvísi at tosa um almennu og privatu fjølmiðlarnar, og sjálvsagt kunnu vit politikarar ikki blanda okkum ov nógv í privatu viðurskiftini, vísir mentamálaráðharrin á.

Jógvan á Lakjuni eftirlýsir eisini fleiri tíðindafólk við útbúgving, og júst hetta var eisini uppi at venda á áðurnevnda fakfestivali, sum Synergi skipaði fyri. Tá varð víst á, at einki annað land í heiminum hevur so nógvar journalistar, sum ikki hava journalistiska útbúgving, og hetta heldur mentamálaráðharrin sæst aftur.

– Talan er sjálvsagt um ein trupulleika, vit ikki eru harrar yvir, men fleiri teirra, sum skriva, duga einfalt ikki nóg væl, heldur Jógvan á Lakjuni. Við færri blaðútgávum hevði hesin trupulleikin sambært landsstýrismanninum heldur ikki verið eins sjónligur í føroyska blaðheiminum.

– Men sum sagt er hetta ikki nakað, politikarar eru harrar yvir, men hesar áskoðanir mínar eru einfalt eygleiðingar, sum eg so havi gjørt niðurstøður til, sigur Jógvan á Lakjuni.

Talan er í roynd og veru um eitt gamalt og støðugt afturvendandi kjak, sum helst hevur sín uppruna í fíggjarligu fortreytunum hjá bløðunum, men mentamálaráðharrin heldur tó fast við, at føroysku bløðini slaka, tá góðskan í útgávum verður raðfest.

## Stuðul hevði ment bløðini

**– Orsakað av neyðugu inntøkunum og hørðu kappingini við loftmiðlarnar er ógjørligt at minka um tíðindaframleiðsluna á bløðunum, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Fólk vilja vita, hvat hendir í samfelagnum, og her eru vit noydd at fylgja við í kappingini við loftmiðlarnar, sum koma út við tíðindum so gott sum hvønn dag, sigur Jan Müller á Sosialinum*

Eing og stjórin á Dimmalætting tekur oddamaðurin á Sosialinum heldur ikki undir við uppskoti mentamálaráðharrans at skerja í blaðútgávunum.

Jan Müller sigur, at tá tað undir kreppuni gjørdist neyðugt at økja útgávutalið upp í fimm, vísti hetta seg at vera ein røtt avgerð, sum bjargaði føroysku bløðunum. Men sambært Jan Müller eru aðrar orsøkir enn tær fíggjarligu.

– Vit liva m.a. av at selja tíðindi, og tíðindi eru ikki avmarkað til bara nakrar ávísar dagar um vikuna. Fólk vilja vita, hvat hendir í samfelagnum, og her eru vit noydd at fylgja við í kappingini við loftmiðlarnar, sum koma út við tíðindum so gott sum hvønn dag, sigur Jan Müller.

Ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum vísir á tað funktión, bløðini hava í dag, bæði sum almenn tænasta fyri felagsskapir, stovnar, feløg og einstaklingar, men eisini sum garantur fyri nýggjum tíðindaflutningi og orðaskifti.

– Allar hesar uppgávur gera tað alneyðugt, at vit geva blaðið út ofta, tí umframt, at fólk ikki lesa gomul bløð, er hetta eisini neyðugt fyri lýsingarinntøkurnar, sigur Jan Müller. Fyri at menna blaðheimin mælir leiðarin á Sosialinum í staðin til, at stuðul verður latin til bløðini.

– Í grannalondum okkara verður týdningurin av bløðunum mettur at vera so stórur, at stuðul verður veittur, men í Føroyum finst eingin slíkur, sigur Jan Müller at enda.

## Óhugsandi at skerja



*– Um mentamálaráðharrin vil menna blaðheimin, má hann finna betri grundgevingar og hugskot, heldur Ingi Samuelsen, blaðstjóri á Dimmalætting*

**– Góðskan hevði ikki hækkað, um vit minkaðu útgávutali, tí so noyddust vit av fíggjarligum orsøkum samstundis at skerja arbeiðsorkuna samsvarandi, sigur Ingi Samuelsen, blaðstjóri á Dimmalætting**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Blaðstjórin á Dimmalætting tekur á ongan hátt undir við metingum mentamálaráðharrans at menna góðskuna í føroyska blaðheiminum.

– Vit hava einfalt ov nógv brúk fyri inntøkunum til aftur at kunna skerja útgávutalið á blaðnum, eru fyrstu viðmerkingarnar hjá Inga Samuelsen á Dimmalætting. Hann leggur afturat, at um útgávutalið verður skert, má medarbeiðaramanningin skerjast samsvarandi, og tískil hevði góðskan verið tann sama, meðan færri bløð komu út.

-– Um mentamálaráðharrin vil menna blaðheimin, má hann finna betri grundgevingar og hugskot, heldur Ingi Samuelsen.

Hann vísir á, at einstaki journalisturin sjálvsagt hevði havt betri stundir at gera sær ómak, men tilfarið í blaðnum hevði hinvegin verið munandi minni, og hetta hevði hvørki verið áhugavert fyri keypara ella lýsara.